# i millum Føroyar og Hetland



*Nú nátt kemur á, er frískur vindur og sjaskut í veðrinum. Vit hava hann aftan tvørs og stýra undan, tá ið aldan brýtur*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Ferðin til oynna, Whalsay og bygdina, Synbister, sum liggur hálvan annan tíma norðanfyri Lerwick, tók 29 tímar. Smágentan, Tóra, sum er við Knørri úr Kollafirði, er troytt eftir longu ferðina*

Mynd: Vilmund Jacobsen

og eystur á oynna, Whalsay, har vit vóru um 23-tíðina mikukvøldið. Tá vóru 29 tímar umlidnir, síðan vit settu kós úr Borðuni um náttúrðatíð kvøldið fyri.

Á Whalsay, har stívliga 1000 fólk búgva, lógu vit í tvær nætur, áðrenn kósin varð sett móti Lerwick um middagsleitið hósdagin.

Á oynni hittu vit av tilvild eina havnarkonu, sum hevur búð í Hetlandi í fimti ár. Hon giftist bretskum hermanni, og maður hennara doyði fyri umleið 20 árum síðan.

Vit hildu fyri, tá ið vit møttu henni í túninum, at Hetland er eitt vakurt land.

- Jú, her er vakurt, men Føroyar eru vakrast, segði blíða havnarkonan, Mia, sum vit fara at venda aftur til í eini aðrari grein úr Hetlandi.



*Seinna helming av ferðini høvdu vit fínasta veður og sól. Nú eru vit í vøkru innsiglingini til Yell-sundið, sum er millum oynna Mainland og Yell*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Morgunin eftir skein sólin oman og niðan, og mangir sjófararar nýttu høvi at sóla sær og ganga túrar í vøkru og hugnaligu bygdini, har havnarkonan, Mia, hevur búð í mong ár*

Mynd: Vilmund Jacobsen